TVØROYRAR KOMMUNA

# Býráðsskrivari

Søkt verður eftir býráðsskrivara at byrja 1. januar 2009.

**Høvuðsarbeiðsuppgávur:**
- Vara av fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu stýringini í Tvøroyrar kommunu
- Planleggja, raðfesta og samskipa
- Tryggja dagligu arbeiðsgongdirnar
- Tryggja eitt gott samskifti við borgarar og viðskiftafólk
- Ansa eftir, at fíggjarætlanin verður hildin
- Ansa eftir at lógir, reglugerðir og samtyktir verða fylgdar
- Skipa fyri fundum
- Aðrar uppgávur í fyrisitingini

**Førleikakrøv:**

**Útbúgving:**
- Relevanta útbúgving, hægri útbúgving, útbúgving innan skrivstovuøkið ella líknandi førleika

**EDV: Kunnleiki til m.a. hesi forrit:**
- Journalskipan
- Tekstviðgerð
- Rokniark
- Kalendara- og t-postskipan

**Royndir:**
Ynskiligt er at viðkomandi hevur royndir innan almenna fyrisiting og innan leiðslu.

**Annað:**
Viðkomandi, ið settur verður, hevur tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, ið kunnleiki fæst til gjøgnum starvið, eisini aftaná, at viðkomandi er farin úr starvi.

**Persónligir eginleikar:**

**Skal m.a.:**
- Vera málsøkjandi og framsøkin
- Hava bæði fak- og menniskjaligar góðar eginleikar
- Kunna virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og eggja teimum at menna tænastustøðið
- Vera trúgv/ur móti tiknum avgerðum
- Hava virðing, fatan fyri og vilja til at samstarva við ta politisku skipanina

**Løn:**
Starvið verður lønt samb. sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir v.m. skulu vera Tvøroyrar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 1. des. 2008 kl. 15.00.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristin Michelsen, borgarstjóra á tlf. 37 10 85 ella tlf. 22 11 91.

Umsókn skal sendast til:
Tvøroyrar kommunu
Tvørávegur 37
800 Tvøroyri



## GONGUTÚRAR Í ÍSLANDI

**Tilkomið fólk gongur eisini eftir Laugarvegnum til þórsmørk**

**Tlf. 212358**
**foroyar.net**

# Gøtu skúli

við Gjónna 4 · Postrúm 24 · 511 Gøtugjógv
Tlf. 441059 / 771019 · Fax 441595
skurin@post.olivant.fo · www.skulin.fo/got

## Val av foreldraumboðum í Gøtu skúlastýri

Val til Gøtu skúlastýri verður í Gøtu skúla hin 11. november 2008.

Inngongdin er hin sama sum til bygdaráðsvalið. Atkvøðutíðin verður kl. 10 00 – kl. 20 00.

Valevnini eru hesi (skipað í stavrøð eftir eftirnavni):

| | |
|---|---|
| Eli Eiriksson | Norðragøtu |
| Rønn Eliasen | Syðrugøtu |
| Niels Gregersen | Norðragøtu |
| Oluffa Hammer | Norðragøtu |
| Oluffa á Høvdanum | Syðrugøtu |
| Joan Jacobsen | Norðragøtu |
| Tórolvur Jacobsen | Norðragøtu |
| Janus Joensen | Norðragøtu |
| Anni Olsen | Syðrugøtu |
| Helen Pállson | Norðragøtu |
| Katrin Petersen | Syðrugøtu |
| Heidi I. Tværfoss | Norðragøtu |
| Marni Tyril | Norðragøtu |

**Valnevndin fyri skúlastýrisvalið í Gøtu skúla**

# Spildurnýggjur bilur til sølu

## – við stórum avsláttri



Ein spildurnýggjur reyður Ford Fiesta 1.4 Duratec 16V (5 hurðar) til sølu við stórum avsláttri.

Bilurin er frá oktober 2008 og hevur koyrt 22 km.

Nýprísur: kr. 170.000,-

**Áhugað kunnu ringja á telefon: 315018 ella 515018**

# Epileptikarafelag Føroya

Aðalfundurin 2008 verður hildin í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, Tórshavn.

**Týsdagin, 2. desember 2008 Kl. 19.00**

Skrá sambært lógum felagsins.

Jóhanna Andreasen, menningarsjúkrarøktarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, kemur at tosa um mentalar forðingar.

Kaffi og rísalamand verður eftir fundin.

**Nevndin**



# TØKK

Øllum tykkum sum vóru við til at hátíðarhalda 100 ára dagin hjá kirkju okkara takka vit hjartaliga.

Stóra tøkk fyri blómur og gávur bæði frá nevndum og ónevndum gevarum.

Ein serlig tøkk til Jógvan Fríðriksson, bisp og til prestarnar Símun Jacobsen, Jónsvein Bech og Elsu Funding.

**Kirkjuráðið í Sandvík**

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN
FAROESE FISHERIES LABORATORY
Nóatún · Boks 3051 · FO-110 Tórshavn

# Biologassistentur

Søkt verður eftir biologassistenti til fiskideildina á Fiskirannsóknarstovuni.

Høvuðsuppgávurnar á fiskideildini eru at gera rannsóknir og savna inn tilfar (lívfrøði, veiða, roynd v.m.), soleiðis at stovnurin verður førur fyri at meta um tilfeingið í sjónum og við støði í hesum metingum at ráðgeva um skilagóða troytan av hesum tilfeingi.

Arbeiðið sum biologassistentur er m.a. prøvataking á landi og sjógvi og praktiskar fiskiroyndir, herundir sigling við Magnusi Heinasyni og leigaðum førum, telduføring og rættlestur av úrslitum v.m.

Hóskandi er, at umsøkjarar hava útbúgving frá fiskivinnuskúla, navigasjónsskúla ella líknandi. Royndir innan fiskivinnuna hava týdning.

Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Umsóknarfreistin er 1. desember 2008. Umsóknir við prógvum, yrkisgongd (curriculum vitae), viðmælum o.ø. skulu sendast til Fiskirannsóknarstovuna, Postrúm 3051, Nóatún 1, FO 110 Tórshavn. Starvið verður sett skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Fiskirannsóknarstovuna á tlf. +298 353900.